VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Lot til andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.



Veðrið hósdagin:
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og kanska okkurt ælið. Seinnapartin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Fleyr til gul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt. Hitin um 7 stig. Sunnudagin veksur hann vindin av vestri og ælingur, partvís kavi. Hitin um 2 stig.

Bamse og vinirnir til Føroya

Undirhald: Lagt er upp til rimmar veitslu í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, tá Bamses Venner spæla til dans tann 25. september í ár

Jákup Mørk

Tann 25. september spælir Flemming Jørgensen – alias Bamse – til dans á Hálsi í Havn

Argja Bóltfelag hevur seinnu árini skipað fyri stórum dansi, tá kvøldini myrkjast móti heysti, og 2010 verður einki undantak. Tvørtur ímóti tekur AB eitt fet upp eftir hesaferð, nú teir hava fingið Flemming Jørgensen – alias Bamse – til Føroya.

Tað eru kanska ikki øll løg hansara, sum eru originalløg. Í fleiri førum er talan um plagiat av útlendskum hittum, men hesi hava so sanniliga eisini rakt donsku fólkasálina og tí føroysku við.

Vimmersvej, Vi' du danse med mig, Spil whist igen, Tre tænder og fleiri aðrir eru dømi um slík løg, har tað fyrst og fremst er lagið, sum verður endurnýtt, meðan orðini bara í heilt fáum førum hava nakað við upprunatekstin at gera. Onnur løg hava verið egin løg hjá Bamse og nú ein mest sum ófatuliga produktiv yrkisleið er farin um tey 35 árini, eru endurspælingar av stórum balladum eisini at finna millum eyðkennini hjá Bamse.

Bamse og vinirnir sendu fyrstu útgávuna á marknaðin í 1975, og síðani hevur bleyta røddin verið fólkaogn hjá dønum. Hvørt ár er talan um hóptals framførslur til bæði minni og størri tiltøk í Danmark, og nú er tíðin so eisini komin til Føroyar.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-6
Nuuk	-3
Qaqortoq	9
Ammassalik	1
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	5
Seyðisfjørður	2
Tórshavn	4
Lerwick	5
Aberdeen	3
London	4
Tromsø	-1
Bergen	2
Oslo	-6
Stokkhólm	-2
Keypmannah.	-1
Helsinki	-2
Moskva	-13
Berlin	-4
Warzawa	-6
Kiev	-12
Bukarest	-6
Paris	5
Madrid	9
Róm	10
Malorca	14
Athen	10
Malta	13
Tunis	15
Beijing	4
New Dehli	23
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	--
New York	0
Miami	15
Los Angeles	13
Meksikobýur	--
Panama	31
La Paz	15
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	25

LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:



Komandi nátt:



Síðstu nátt:
Eitt hátrýst, 1026 hPa. millum Íslands og Føroya fer spakuliga suðureftir.

Komandi nátt:
Hátrýstið í útsynning úr Føroyum fer spakuliga suðureftir og gevur framvegis góðveður á okkara leiðum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 07/02 kl. 06⁰⁰ – 08/02 06⁰⁰. Hitin í gjár: 3,7°
Minsti hiti máldur í februar: -11,0° -
Mesti hiti máldur í februar: +11,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 07/02 kl. 06⁰⁰ – 08/02 06⁰⁰.
Avfallið higartil í februar: 14 mm

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo

VESTFALLSKYRRINDI

30. januar	Mánin næstur jørðini
5. februar	Seinna kvarter
13. februar	Mánin longst frá jørðini
14. februar	Tendring

Kelda: Almanakkin 2010

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
8. feb	02:23	14:48	01:23	13:48	01:38	14:03	04:23	16:48	05:23	17:48	00:38	13:03	-	12:03	02:38	15:03	03:38	16:03	02:08	14:33	03:23	15:48
9. feb	03:13	15:38	02:13	14:38	02:28	14:53	05:13	17:38	06:13	18:38	01:28	13:53	00:28	12:53	03:28	15:53	04:28	16:53	02:58	15:23	04:13	16:38
10. feb	04:01	16:25	03:01	15:25	03:16	15:40	06:01	18:25	07:01	19:25	02:16	14:40	01:16	13:40	04:16	16:40	05:16	17:40	03:46	16:10	05:01	17:25
11. feb	04:48	17:12	03:48	16:12	04:03	16:27	06:48	19:12	07:48	20:12	03:03	15:27	02:03	14:27	05:03	17:27	06:03	18:27	04:33	16:57	05:48	18:12
12. feb	05:34	17:56	04:34	16:56	04:49	17:11	07:34	19:56	08:34	20:56	03:49	16:11	02:49	15:11	05:49	18:11	06:49	19:11	05:19	17:41	06:34	18:56